FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 30. januar 2025
J. nr.: 25/01413-2

Skrivligur fyrispurningur
eftir §52a í Tingskipanini

Svar frá Ruth Vang, landsstýriskvinnu, til §52 a – fyrispurning nr. 52-072/2024 frá Hans Jacob Thomsen, løgtingsmanni, um skatt av lágum inntøkum

Spurningar:

1. Hvussu nógv í landsskatti rindaði ein mánaðarlig inntøka á ávikavist 17.500 kr., 22.500 kr., 27.500 kr., 32.000 kr., 37.500 kr., 50.000 kr. og 85.000 kr. í 2015?

2. Hvussu nógv í landsskatti rindar ein mánaðarlig inntøka á ávikavist 17.500 kr., 22.500 kr., 27.500 kr., 32.000 kr., 37.500 kr., 50.000 kr. og 85.000 kr. í 2025?

3. Hvussu stóra skattalækking/-hækking hava inntøkurnar omanfyri fingið í 2025 í mun til 2015?

Svar

Talva 1 vísir hvussu nógv, fólk við somu mánaðarligu inntøku, rinda í skatti ávikavist í 2015 og í 2025.

Sum talvan vísir, rinda allir bólkar minni í landsskatti í 2025, enn í 2015.

Talva1

krónur um mánaðin				*krónur um árið*
inntøka	landsskattur 2015	landsskattur 2025	munur	munur
17.500	2.417	1.621	- 796	- 9.550
22.500	3.417	2.371	- 1.046	- 12.550
27.500	4.417	3.121	- 1.296	- 15.550
32.000	5.317	4.021	- 1.296	- 15.550
37.500	6.417	5.121	- 1.296	- 15.550
50.000	9.333	8.246	- 1.088	- 13.050
85.000	19.000	18.746	- 254	- 3.050

Samanberingin í talvu 1, skal tó takast við tí fyrivarni, at seinastu 10 árini er prís- og lønarlagið hækkað. Lønarlagið í 2025, kann væntast at vera yvir 30 %[1] hægri, enn í 2015. Í sama tíðarskeiðið er brúkaraprístalið hækkað góð 20 %[2]. Ein króna í 2025 hevur tí ikki sama virði, sum ein króna í 2015.

Gjøgnumførda skattaumskipanin í 2024-2025 gevur serliga lág- og miðalinntøkum ein munandi skattalætta. Hetta var eisini endamálið við umskipanini. Sum frá líður ger prís- og lønarvøkstur, at inntøkuskatturin økist aftur, hóast Løgtingið ikki broytir skattin. Tí fari eg í næstum at senda uppskot til almenna hoyring, um javning av skatti og avgjøldum.

Tinganes, 30. januar 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum

[1] Miðinntøkan frá nov. 2014 til nov. 2024 er sambært hagstovuni hækkað 35%. Almenni lønarkarmurin er frá 1.okt 2024 til 1. okt 2024 vaksin 31%.
[2] Brúkaraprístalið er vaksið 21% frá nov. 2024 til nov. 2024